## Ronaldo í essinum hóast mótburð

Christiano Ronaldo spældi í gjárkvøldi sín fyrsta dyst, eftir at hann var atvoldin til reyða kortið, sum Wayne Rooney fekk í 1/4-finaluni í HM millum Ongland og Portugal.

Hetta hendi, tá Manchester United vitjaði hjá Oxford í venjingardysti, og ikki óvæntað varð Ronaldo møttur við ókvæmisrópum, tá hann kom á vøllin. Líka legði ungi portugisin tí hetta. Hann skeyt nevnliga tvey av málunum hjá United og 4-1 sigrinum, og tá hann varð skiftur út, fekk hann stórar klappsalvur frá reyðu áskoðarunum.



## Vágbingur til B36

VB skrivar á heimasíðu sínari, at unglingaspælarin, Henning Joensen, nú flytir til B36. Henning byrjar eftir summarfrítíðina á Miðnámsskúla í Havn, og tá er munandi lættari at spæla fótbólt í høvuðsstaðnum heldur enn í heimbygdini.

Og einki er at ivast í, at B36 við hesum hevur fingið ein evnaríkan spælara í hópin. Henning hevur verið fastur partur av føroysku U-landsliðnum seinnu árini, og hann var eisini við á U-19 landsliðnum, sum var partur av norðurlendsku U-17 kappingini herfyri.

**-mørk**

B68-NSÍ 1-5 (1-2)):

# Eingin slingur í hjá NSÍ

*B68*

*NSÍ*

**Hóast B68 legði seg á odda og var tætt við at økja um leiðsluna, so vikaði hetta ikki NSÍ, sum í tjúgu minuttir skoraði fýra mál**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

B68 er botnlið, og NSÍ rennur eftir fremsta plássinum. Fyrsta hálva tíman sæst ikki nógv til, at munurin á stigatalvuni er stórur. B68 fekk hol á í 8. minutti, tá ið Julian Johnsson, sum leingi var ytsti miðvallarin í høgru, eftir diagonalsending úr vinstru, rak eitt sindur móti miðjuni, áðrenn hann smekkaði til, og bólturin sigldi í handara síðunetið.

B68 fegnaðist, og næstu løtuna var tvær ferðir um reppið, at teir fingu meiri at fegnast um. Teir royndu at spæla heldur enn at sparka, bólthaldarin hevði fleiri møguleikar at spæla, og í løtum eydnaðist tað teimum heilt væl.

Hendrik Rubeksen, sum var grammur í 1. hálvleiki, fekk tvær ferðir møguleikan, men Jens Martin Knudsen var honum ov boysin.

So var tað, at tað fór at síggjast alt meiri til, at NSÍ telist millum oddaliðini. Christian Høgni Jacobsen var støðug hóttan fyri B68 verjuna, miðvøllurin stóð seg væl, Helgi L. Petersen arbeiddi væl, og Jens Martin var tryggur aftasti skansi.

Óli Hansen stútaði til 1-1, tá ið hálvur tími var farin. B68 verjan megnaði ikki at halda honum, hóast frísparksframleggingin sigldi einar 35 metrar í brotsteigin. Og minuttin undan hvíldini fekk NSÍ málið, sum vísti seg at vera mønustingurin hjá toftamonnum. Talan var um stórt mistak í B68 miðverjuni, tá Kári Hansen totalkiksaði, og so gjørdist Óli Hansen púra leysur.

### Sløktu kontaktina

Beinanvegin eftir steðgin fekk NSÍ eitt mál afturat. So var tað bara ein spurningur, hvussu stórur sigurin fór at verða. Sonni L. Petersen skoraði mál til 3-1. B68 misti í roynd at byggja upp í høgru, Christian Høgni Jacobsen spældi til Sonna, sum úr átjan metrum sendi upp um B68 málverjan og upp undir nettakið.

Christian Høgni skoraði sjálvur til 4-1, tá ið ein tími var farin. Hann sneiddi framvið afasta verjuspælaranum, sum dómarin metti gjørdi brotsspark. Tórður Thomsen hálvbjargaði royndini hjá Christian Høgna úr ellivu metrum, men landsliðsmaðurin var fyrstur á returinum.

Tveir minttir seinni varð NSÍ stórsigurin staðfestur. Viggo Johannesen rann fram í hornasparksinnlegg úr vinstru og stýrdi við høvdinum bóltin í B68 málið.

Síðsta hálva tíman var eingin ivi um, at tað var NSÍ, sum er topplið, og at tað er B68, sum stríðist fyri at sleppa undan niðurflytingini. NSÍ hevði stórt yvirskot, og spælararnir hildu høvdið kalt. B68 spælararnir tóktist ikki hava nógva orku, og tað sigur ikki so lítið, at teir síðstu sjey minuttirnar, tá ið alt langt síðani var avgjørt, fingu fýra gul kort!



*Toftamenn fingu einki gjørt við grannarnar týskvøldið, tá NSÍ vann søtan og trivaligan sigur*

*Mynd: Álvur*

## Í NSÍ ræðast teir ongan

Einki er at siga til, at Trygvi Mortensen, venjari hjá NSÍ, var stak væl nøgdur, tá ið hansara menn høvdu vunnið 5-1 á Svangaskarði. Hetta er næststørsti NSÍ sigurin nakrantíð á Toftum. Í fyrraárið, tá ið B68 flutti niður, vann NSÍ 5-0 á Svangaskarði.

– Tað kendist eitt sindur striltið fyrstu løtuna. Men talan var ongantíð um panikk. Vit gjørdu onkrar justeringar á miðvøllinum. Óli Hansen gjørdist meiri verjukendur, og Bogi Løkin meiri álopskendur. Tí var tað eitt sindur undarligt, at Óli skoraði tvey tey fyrstu málini, heldur Trygvi Mortensen, sum eisini minnir á, at Sonni L. Petersen eftir uppspæl og innlegg úr høgru í tveimum førum átti at havt skorað í 1. hálvleiki.

*Hvat var stóri munurin á liðunum?*

– At vit eru meiri samanspældir. Tað sigur seg sjálvt. Vit hava ikki havt so nógvar skiftingar, meðan teir spældu við fleiri nýggjum monnum. Eg haldi eisini, at tað undan steðginum kendist, at okkara áttu meiri orku enn B68.

*Hvussu við framtíðini?*

– Hon sær ógvuliga spennandi út. Nú eru vit á øðrum plássi, og vit eiga dyst til góða móti B36. Vit ræðast ongan, men vit taka allar uppgávurnar í álvara. Tað verður torført móti ÍF, HB og B36, og so fæst at síggja, hvussu støðan verður, tá ið vit skulu norður á Mølina, hugleiðir Trygvi Mortensen.~

VB/Sumba-Skála 0-4 (0-1):

# Skála rykkir úr botninum

*VB /Sumba*

*Skála*

**Við tryggum 4-0 sigri í Vági hevur Skála av álvara vunnið seg úr niðurflytingarvandanum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Skála hevði at kalla ongar trupulleikar, tá teir vitjaðu í Vági týskvøldið. Serliga fyri steðgin var yvirvágin sjónlig, tá skála hevði vindin undan. Skála søkti støðugt á málið hjá heimamonnunum, men tað var tó bert ta einu ferðina, at úrslit spurdist burturúr. Hetta tá Pauli G. Hansen vann bóltin av verjuspælara fyri síðani ósjálvsøkið at spæla boga Gregersen púrasta leysan.

Eftir steðgin høvdu gestirnir vindin ímóti, men tað vóru framvegis teir, sum stýrdu tí mesta. Hampuliga tíðliga komu teir eisini upp á 2-0, tá Bogi Gregersen enn einaferð stóð blankur – hesa ferð eftir uppspæl frá Levi Hanssen – og so var at kalla leyst og liðugt.

Hóast aftan fyri við tveimum málum, so vágaðu vágbingar ikki tað heilt stóra frameftir, men kortini eydnaðist tað tvær ferðir Skála at økja. Fyrst tá Debus Danielsen hálvkiksaði skot, sum Jónhard Frederiksberg tó fekk stýrt í málið, og aðru ferðina tá Johan Troest Davidsen stútaði innlegg frá Jónhard í kassan.

*Skála togaði seg av álvara leyst úr botninum, tá teir vunnu knúsandi tryggan sigur í Vági*

*Mynd: Áki Bertholdsen*



### Hugsa enn um strikuna

Hóast sigurin at kalla beindi alt niðurflytingartos burtur av Skála, so vildi tvífaldi málskjúttin í dystinum, Bogi Gregersen, ikki gera tær heilt stóru staðfestingarnar eftir dystin.

– Tað sær sjálvandi betri út, nú vit hava fingið eitt sindur av luft, men enn kann nógv henda. Í so máta verða teir báðir komandi dystirni – móti B68 og ÍF – rættiliga avgerandi. Vinna vit teir, so eru vit mest sum púrasta leysir, og tað hevur fyrst og fremst verið málsetningurin eftir steðgin.

Og byrja tit so eisini at líta longur upp eftir stigatalvuni.

– Tað veit eg ikki. Enn er munurin uppeftir dekan ov langur, og tá veldst jú eisini um, hvussu hini úrslitini laga seg. Men sjálvandi vóna vit, at tað verður støðan.

## Mistøkini vóru dýr

Nýggi B68 venjarin, Bill Jacobsen, var ikki sligin í gólvið, hóast liðið hjá honum hevði lagt rygg til 5-1 tap á heimavølli.

– Í 1. hálvleiki royndu vit at spæla, og tað hepnaðist væl. Vit fingu eitt mál, og um tað visti væl við, so fingu vit eitt afturat, áðrenn teir fingu hol á. Tað var óheppið, at teir komu á odda so stutt undan steðginum, og tað var harmuligt, at vit gjørdu so nógv persónlig mistøk. Teir fingu fimm mál, og sæð frá okkara sjónarmiði mugu vit staðfesta, at øll málini vóru orsøk av persónligum mistøkum. Tað boðar eisini frá NSÍ dygdum, at teir megna at sekta mistøk.

*Tað sær einki serligt út?*

– Í botnstríðnum er støðan tann sama, sum hon var undan týskvøldinum. Eg haldi, at vit skulu fokusera upp á góðu løtuna undan steðginum og taka ta royndina við okkum til næsta dyst, sigur Bill Jacobsen.

**-mørk**